# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar

19. aug. fingu Begga og Búgvi Vang, Fuglafjørður, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3850 gr.

25. aug. fingu Herdis Beder og Jón Simonsen, Fuglafjørður, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4000 gr.

26. aug. fingu Augusta og David, Søldarfjørður, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4130 gr.

27. aug. fingu Laila og Leif av Reyni, Kollafjørður, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3950 gr.

28. aug. fingu Debora Hjelm og Niels J. Nielsen, Sørvágur, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 4159 gr.

29. aug. fingu Súsanna og Regin Toftegaard, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3500 gr.

1. sept. fingu Sylvia Henriksen og Rani S. á Lofti, Argir, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3250 gr.

1. sept. fingu Gunnvá S. á Lofti og Jens Kristian Haraldsen, Sandavágur, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3940 gr.

1. sept. fingu Joan M. Poulsen og Heðin Næss Joensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3310 gr.

1. sept. fingu Tóra Láberg og Hallur Petersen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3700 gr.

2. sept. fingu Sanna Hansen og Dánjal Egilstoft, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3600 gr.

2. sept. fingu Miriam Nolsøe Johannesen og Anton Sigmarsson, Hoyvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3600 gr.

# Johann Toftum til minnis

**Ein seinasta heilsan til Johann Toftum, vanliga nevndur Johann í Kálhaganum, føddur 3. juli 1932, deyður 7. aug. 2009**





*Nú Johanngubbin farin er foldum frá,
tað fløvandi er at minnast aftur á
tær stundir frá barnaárum,
sum eru ritaðar í hjørtum várum.*

*Tá Vatnið á vetri var fryst til ís,
tú kynstir vísti til fyrsta prís.
Á nýggjárum so spennandi var,
tá bumburnar geltu um húsagarð.*

*Tær løtur tú munnharpuna hevði,
tá strálaðu barnaeygu,
og lætt var at fara upp á tá.
Ja, mangt stuttligt er at minnast á.*

*At bera uppá rím, tað fall tær lett,
manga barnasál hetta hevur glett.
Tær gávur, ið komu úr tíni hond,
verða tær løntar á Himnastrond.*

*Um onkuntíð tað henda má,
ein eingil vitjar foldum á.
Hann ogon ber tey boðini fram:
»Heilsa frá Johann, hvis tú kann!«*

Friður verði við minninum um ogra kæra Johanngubba.

**Heilsan »gubbabørnini«**

# 50 ára hátíðarhald í 1990



Mynd frá ”Realskúlaframsýningini 1916-66”, sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Myndin her er frá 50-ára hátíðarhaldi hjá fyrrverandi realskúlanæmingum, sum varð hildið í Hornahúsinum í 1990.

**Aftara rað f.v.:** Margit Jacobsen, Elisa Hansen, Oda Gaard Hansen (Olsen), Karolina Petersen, Gunhild Guttesen, Poula Jacobsen (Christiansen), Inga Juul Vitalis, Guðny Jacobsen (Rubeksen) og Ingibjørg Holm Jacobsen (Johannesen).

**Miðraðið f.v.:** Ebba Andreassen (Winther), Helena Dahl Christiansen (Poulsen), Ella Ellendersen (gift í Kanada), Anna Jacobsen (Long) og Meinhardt Arge.

**Fremst f.v.:** Oluf Simonsen, Ejler Egholm og Dánjal Magnussen.

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024. (mynd nr. 225)

*Myndaeigari: Poula Christiansen*